# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

## Plettskot fyri alla familjuna

Tað eru nýggjar tíðir. Í staðin fyri at leggja summarætlanir, sum hava hoygging, fuglaveiðu og stevnur og serliga Ólavsøku sum karm, snýr tað seg nú um frítíð, ferðing og festivalar.

Um tað eisini tey næstu árini fara at vera so nógvir festivalar, sum tað hava verið í summar, ella um teir fara at vera fleiri ella øðrvísi festivalar, fer bara framtíðin at vísa.

Hvør í sínum lagi hava fyrireikararnir roynt at leggja til rættis. So hevur tað verið upp til tey, sum skulu rinda, at gera av, hvussu fíggjarliga grundarlagið er at halda fram. Her verður hugsað um sponsorar og fyrst og fremst áhoyrararnar. Men tað er eingin ivi um, at festivalar eisini í framtíðini fara at verða partur av føroyska sumrinum.

Festivalarnir eru avbjóðing hjá summarstevnunum. Norðoyastevnan man kenna seg í tronga, og eftir Ólavsøku í ár varð sagt, at sammett við undanfarnu árini hevði talan verið um afturgongd í luttakaratali og harvið eisini í umsetningi.

Spurningurin er so, hvussu stevnurnar fara at arta sær, nú tær eru í kapping. Tá ið tær sóu dagsins ljós, var tað ikki so nógvur ítróttur, sum tað er nú á døgum. Broytta fyritreytin kann bera við sær, at summarstevnurnar fara at verða broyttar. Kanska Norðoyastevnan fer at verða kappróðrarstevna, meðan mentanarligu tiltøkini fara at verða flutt til í august, tá ið tey í Klaksvík hava kommunu føðingardag, festival og sjómannadag.

Stór avbjóðing stendur fyri framman hjá ólavsøkuni, sum fær fleiri av stóru tiltøkunum upp í hondina – kappróðrar finaluna, skrúðgonguna og kórsangin og steypafinaluna. Hóast Ólavsøkan skal líkjast sær sjálvari, so kennist tað sum um, at tað er neyðugt við nýhugsan.

Í vikuskiftinum var talan um plettskot í Klaksvík, hóast onkur skeina var at síggja. Øll ættarliðini áttu tilboð í skránni, og tað hilnaðist væl. Veðrið skikkaði sær ikki, sum tað verður vónað, at tað skal gera fyrsta vikuskiftið í august, men tað gekk kortini. Fyrireikararnir eiga rós uppiborið fyri, at teir løgdu nógv fyri í royndini at fáa stóru nøvnini at koma henda vegin.

Ivaleyst fer spurningurin nú at verða viðgjørdur, um tað kann gerast meiri við plan B og møguleikan fyri innandura tiltøkum, tá ið tað kanska fer at vita heilt illa við. So leingi, sum tað bara er ein flogvøllur í Føroyum, fer tað ikki at bera til at krússa mjørkan av. Ikki uttan luttakararnir koma henda vegin fleiri dagar undan ásetta degnum – kanska sjóvegis!

Nú bíða vit eftir næsta stóra tiltakinum í Klaksvík. Tað verður sjómannadagurin annan leygardag. Fyribils verður takkað fyri stórfingna familju festivalin.

**Sosialurin**

## Íleggingargrunnurin ikki til útbygging av donskum ognum



**FINNUR HELMSDAL,**
tjóðveldismaður

Landsstýrið við løgmanni á odda hevur júst avtalað við donsku stjórnina, at flogvøllurin vesturi í Vágunum skal byggjast út fyri nakrar hundrað milliónir. Avtalað er um sama mundið, at útbyggingin skal fíggjast úr Íleggingargrunninum fyri Føroyar (gekk fyrr undir navninum 60-milliónagrunnurin), ið er grunnur stovnsettur fyrst í 60'árunum, frá byrjan ætlaður sum eitt íkast í útbyggingingina av fyrst og fremst samferðslukervinum í Føroyum. Tá høvdu føroyingar longu sjálvir fullu ábyrgdina av at byggja vegir og havnir her á landi. Íleggingargrunnurin varð á ongan hátt ætlaður til at fíggja tann partin av útbyggingini av Føroyum, sum danir framman undan høvdu skyldu til at fíggja. Tí er tað blóðskeivt, tá løgmaður sigur tað vera fult og heilt í tráð við andan og ætlanini við Íleggingargrunninum, at útbyggingin av flogvøllinum vesturi í Vágunum verður fíggjað úr Íleggingargrunninum. Flogvøllurin er donsk ogn, og hava teir tí sjálvsagda skyldu at viðlíkahalda- og dagføra flogvøllin við pengum úr danska statskassanum. Danir hava síðan eina ferð í 70'árunum kategoriskt sýtt fyri at halda sínar viðlíkahalds- og útbyggingarskyldur mótvegis Føroyum, dømini eru óteljandi, og er hetta eisini galdandi fyri flogvøllin vesturi í Vágunum.

Nú stendur Føroya løgmaður so og roynir at billa føroyingum inn, hvussu stórsinnaðir danir eru, tí teir vilja útbyggja teirra egna flogvøll fyri pening, sum er ætlaður til annað endamál. Haldi talan heldur er um, at danir fremja beinleiðis rán, tá teir meira enn hálvtøma Íleggingargrunnin til at gjalda egnar rokningar fyri. Hvar er stoltleiki tín Jóannes Eidesgaard?

## Ignorera veruleikan nóg ofta...

**FINNUR HELMSDAL,**
tjóðveldismaður

Í vikuni eftir ólavsøku valdi Sosialurin at nýta ein av sínum leiðarum, fult og heilt, upp á mín persón. Og tað var sjálvsagt ikki við tí góða fyri eyga. Teir góvu ilt av sær, tí eg, enn einaferð, hevði lagt teir undir at vera tendensiøsir. Nú veit eg, at teir á Sosialinum, nógv meira enn aðrir og fyri alt í verðini, vilja hava predikatið "objektivir" fest á bringuna. Trupulleiki teirra er bert, at eigararnir, allir sum ein, ikki bara eru fongdir við sosialdemokratisku basilluni, teir hava allir herviligu javnaðarsóttina í útbroti. Hesi sótt bítur eingin heiligvágur á, og eitt av eyðkennunum er ovurviðkvæmi í mun til flestu tjóðveldisfólk. Og eru vit nøkur tjóðveldisfólk, sum merkja hetta soleiðis, at greinar vit senda blaðnum, mest sum hvørja ferð verða súltaðar til tað óaktuella, onkrar koma enntá ikki í blaðið yvirhøvur. Tað varð hetta eg sipaði til í einari stuttari viðmerking á tingi undir viðgerðini av løgmansrøðuni. Og tí áður nevndi leiðari í Sosialinum.

### Hví grenja

Nú kann ein siga, at eg og onnur tjóðveldisfólk eru grenjut, at vit eru kedd og troytt av at vera á andstøðu, at vit eru frustrerað og annað, sum verri er. Og tað er uttan iva nógv rætt í tí. Best var sjálvandi, at ein lat vera við at grenja yvirhøvur, at ein bara fann seg í øllum. Men tað havi eg valt ikki at gera, m.a. tí eg haldi tað vera rættiligt inntriv í skrivifrælsið, tá landsins størsta tíðindablað er rættiliga tendensiøst. Hetta hóast eg fullvæl kenni avleiðingina av, at ein ger seg til óvin við teir, sum ráða fyri. Í hesum føri við teir, sum avgera um tú verður endurgivin ella ei. Haldi ikki, vit eiga at tiga slíkt burtur. Ein fær sjálvandi meira burtur úr persónliga, um ein velur at tiga og smílast

### Eg lúgvi ikki

Varð í leiðaranum í Sosialinum lagdur undir at lúgva um, hvussu Sosialurin arbeiðir og hevur arbeitt. Yvirskriftin á leiðaranum er: Sig eina lygn nóg ofta... Og sipa teir til, at eg nú so ofta havi endurtikið, at teir á Sosialinum útihýsa ella súlta í mun til politiskan lit, at hetta nú kann fara at verða sannleiki millum manna. Ikki rokni eg við, at annar hvør føroyingur missir álitið á blaðnum, ber eg sigi ella skrivi eitthvørt. Álitið á Sosialinum stendur ella fellur eina og aleina av teirra egna avriki. Skal ikki fara í smálutir um hvussu illa eg eri viðfarin av Sosialinum, skal bara siga so mikið, at inntil ein bleiv tingmaður var als einki at finnast at. Heldur hinvegin. Í langa tíð sendi eg bert greinar til Sosialin. Men aftan á 1998 fekk pípan eitt annað ljóð. Fyrstu ferð eg legði til merkis, at blaðið nýtti skiljirist var, tá ein blaðmaður ringdi fleiri ferðir til mín um at fáa eina 1. mai røðu senda. Hetta tí røðan var so deiliga sosialistisk. Seinni segði sami blaðmaður, at leiðslan sýtti fyri at seta røðuna í blaðið. Grundgevingin var tann, at Sosialurin ikki setti røður í. Hvussu nógvar røður hava ikki staðið í Sosialinum síðan 1998, og ikki bara tær hjá ávísum tjóðveldismanni. Men hetta við røðuni var bara ein fráboðan um tað, sum skuldi koma.

### Óaktuellar politiskar greinar

Blaðgreinar eru týdningarmikil partur av virkseminum hjá einum politikara. Tí er tað eisini av týdningi, at greinarnar eru so aktuellar, sum til ber. Tað er við politiskum greinum, sum við datomerktu matvørunum á handilshillunum. Er farið um dagin, sum stendur á pakkanum, so er kundin ikki áhugaður. Lesarin tímir heldur ikki at lesa óaktuellar greinar. Og teir á Sosialinum kunnu siga,

*Framhald á næstu síðu*

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.